# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
eirikur@sosialurin.fo



# TILTUSKA SÆR EYKA INNTØKUR

Tað kostar skattaborgarunum 81.000 krónur um árið at flyta ein tingmann av Viðareiði til Havnar.

Men tað kostar bara 13.000 krónur um árið at flyta ein vanligan viðing, sum hevur sítt starv í høvuðsstaðnum, til Havnar.

Hetta er løgið, men hetta er veruleikin. Løgtingið hevur samtykt, at tað kostar meira at flyta tingfólk av bygd til Havnar, enn tað kostar at flyta vanlig fólk. Tingfólk hava enntá sína egnu lóg, sum tey sjálvi hava gjørt, sum staðfestir hetta. Samstundis er ein onnur lóg, sum sigur, hvussu nógv vanlig fólk skulu hava endurgoldið av teirra ferðaútreiðslum, um tey hava langan veg til arbeiðis.

Og tað er hesa lóg, sum Jóannes Eidesgaard nú ætlar at broyta. Nú skulu tey, sum koyra undir 50 km til og frá arbeiði als einki endurgjald hava.

Tað er so sjálvsagt, at fólk argast, tá sparingarnar ganga út yvir tey. Soleiðis argast eisini tey ungu, nú boðað verður frá, at landsstýrið vil stimbra lestrarhugin og eggja fleiri ungum at lesa við at taka burtur av stuðulinum og taka burtur av teirra ferðaendurgjaldi.

Men júst hetta dømið um ferðaendurgjald í Føroyum er eitt gott dømi um, hvussu tingfólk seta seg sjálv í hásætið.

Tað er púra burtur úr vón og viti, at tingmenn snýkja sær eina eyka inntøku við at útgjalda sær dýrt ferðaendurgjald - eitt alt ov dýrt ferðaendurgjald. Fyri tingmannin á Viðareiði, so svarar tað til eina skattskylduga inntøku upp á 162.000 krónur um árið - ella 13.500 krónur um mánaðin, tá vit rokna við einum skattatrekki upp á 50%. Tað vil siga, at tingmaðurin á Viðareiði fær tað sama oman á sína mánaðarløn, sum Palleba á Viðareiði fær í skattafríum endurgjaldið um árið. Hetta er óetiskt, um nakað er óetiskt!

Álvaratos, slíkum ómorali hava vit als ikki brúk fyri. Hetta er beinleiðis óreiðiligt, og tí kann Løgtingið ikki tilláta sær at samtykkja uppskotið hjá Jóannes Eidesgaard, um tey ikki samstundis




lækka ferðaendurgjaldið til tingfólk á sama støðu, sum vanlig fólk fáa. Um Løgtingið heldur, at tinfólk av bygd skulu lønast hægri, enn tingfólk í høvuðsstaðnum, so mugu tey samtykkja tað. So er tað ein erlig - um enn óskiljandi - sak.

Sjálvandi skulu okkara politikarar verða væl løntir, tí tað er mangan eitt ótaksamt starv. Men tað er ikki neyðugt, at tey samtykkja sær sjálvum allar møguligar eyka inntøkur - fyri ikki at tala um pensjónir.

Um vit skulu hava virðing fyri tingfólk og tingarbeiði, so eiga tey at lúka somu treytir, sum tey seta okkum - alt annað er ósømiligt.

**Tingfólk eiga at lúka somu treytir, sum tey seta okkum**



*Jørn Astrup Hansen, Richar Mikkelsen, Tage Benjaminsen og Hans Jørgen Laursen*

## Kreppan myndug í dag

Í dag skriva vit 6. oktober. »Svarti oktober« varð hann kallaður árini eftir 1992, tí tað var hendan dagin, at samfelagið fekk ein sannan skelk, tá Sjóvinnubankin fekk deyðadómin frá Fíggjareftirlitinum, og landsstýrið mátti taka um endan. Hetta var byrjanin til »Astrup-skeiðið fyrra«.

»Astrup-skeiðið seinna« byrjar í morgin, tá Jørn Astrup Hansen helst tekur við leiðsluni av nýggja Eik Banka, eftir at aðalfundurin hjá Eik Banka undir trýsti hevur góðkent treytirnar um at lata Finansiel Stabilitet taka yvir bankan og harvið forkoma milliarda virðum hjá gomlu partaeigarunum.

## Støðufastir meistarar

Um sama mundið, sum tað gekk av skriðuni hjá Eik Banka, vendi havnarfelagið HB afturgongd og stagnatión til framgongd og legði seg við sigrinum á NSÍ í Gundadali leygardagin á fremsta plássið í Vodafonedeildini.

Menninir á ovastu rók í HB eru varpaðir á dyr, og nýggjur maður settur at stjórna besta liðnum hjá felagnum. Tað er IKKI Jørn Astrup Hansen, tí hann er settur at stjórna Eik gjøngum brotasjógvarnar, sum hava kosta partaeigarunum milliardaupphæddir.

So galið er tað kortini ikki hjá HB.

Havnarfelagið er í øllum førum ítróttarliga stabilt - ella støðufast - og við Eik - nú alias Finansiel Stabilitet sum sponsori, so kann tað ikki ganga galið móti fuglfirðingum og B36.

Kanska vit fáa eitt fíggjarliga støðufast meistaralið seinni í mánaðinum - tá sjálvur Platini kemur at handa gullmerkini...




*Hans á Lag, ein av tungu dreingjunum hjá HB - stuðlaður av Finansiellum Stabiliteti*



**Vit raðfesta útbúgving**

HELENA DAM Á NEYSTABØ
KJAK Á SÍÐU 12



**Hugsa longur enn til 2015**

HANUS SAMRÓ
KJAK Á SÍÐU 15

## Árni royni seg í X-Factor




Fleiri føroyingar hava seinastu árini tikið lut í sjónvarpskappingum í Danmark, og hóast tað hesa tíðina ikki verður tosað so hart um, hvør er við, og hvør kemur víðari, tí upptøkuroyndirnar skulu takast seinni, so hava vit í øllum førum frætt um onkran føroying, sum roynir seg í X Factor í Danmark í ár. Upptøkuroyndir hava júst verið, og ein av teimum, sum royndi seg, er Árni Petersen. 20 ára gamli klaksvíkingurin lesur teologi niðri, men hann dugir eisini at syngja, og hann hann steig fram fyri Thomas Blachmann og hini í farnu viku. Hvussu úrslitið var av upptøkuroyndini, vita vit ikki við vissu, tí tað er ikki loyvt at tosa so hart um tað, men vónandi fara vit at síggja okkurt til føroyingin í X-Factor sendingunum, sum byrja í næstum.

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*